Brúkarafelagið

# Skynsamur Fjarhiti

**Nevnd:** SkynsamurFjarhiti@gmail.com

Brian Rasmussen, formaður, Eigarafelagið Hoyvíkshædd

Jan Mortensen, Eigarafelagið Inni á Gøtu

Søren Antoft, Eigarafelagið Lítlagil

Jóannes Jacobsen, Eigarafelagið Hoyvíkshædd

Lis Mortensen, Eigarafelagið Inni á Gøtu

## Vit umboða

- ✓ Eigarafelagið Jørundargøta/Torkilsgøta, Hoyvík
- ✓ Eigarafelagið Lítlagil, Hoyvík
- ✓ Eigarafelagið Inni á Gøtu, Hoyvík
- ✓ Eigarafelagið Blómubrekka, Tórshavn
- ✓ Eigarafelagið Eystan Gil, Hoyvík
- ✓ Eigarafelagið Berjabrekka 1, Tórshavn
- ✓ Eigarafelagið Berjabrekka 2, Tórshavn
- ✓ Eigarafelagið Millum Gilja, Hoyvík
- ✓ Eigarafelagið Myllutjørn, Hoyvík
- ✓ Eigarafelagið Hoyvíkshædd, Hoyvík
- ✓ Eigarafelagið í Maritugøtu, Hoyvík
- ✓ Eigarafelagið Undir Kongavarða, Argir
- ✓ Eigarafelagið Eystan Kongavarða, Argir
- ✓ Eigarafelagið Oman Gil, Hoyvík

# Skynsamur Fjarhiti

Brúkarafelag fyri eigarafeløg í Tórshavnar Kommunu
hjá okkum, sum brúka fjarhita

## Spurningar til fjarhitaveitingina í Tórshavnar Kommunu

Lat tað beinanvegin verða sagt, at vit fegnast um, at avlopshiti frá brennistøðini á Hjalla og frá SEV-verkinum á Sundi kann gagnnýtast til upphiting.

Men umstøðurnar hjá fjarhita brúkarum eru órímiligar.

Felagið Skynsamur Fjarhiti er tí stovnað av eigarafeløgum í Tórshavnar kommunu. Felagið umboðar 14 eigarafeløg í Hoyvík, Tórshavn og Argjum við fleiri enn 1200 húskjum, sum nýta fjarhita.

Endamálið við felagnum er at fáa innlit í fjarhitaveitingina í kommununi. Vit hava spurningar til Fjarhitafelagið og eigararnar av felagnum, sum eru Tórshavnar Kommuna og SEV.







## Vit spyrja millum annað:

- Tórshavnar kommuna hevur álagt ávísum borgarum at binda í fjarhitanetið. Ein slík íbindingarskylda átti at verið mótsvarað av, at fjarhitin var ein bílig loysn. Samanberingar vísa, at fjarhiti tvørturímóti er tann dýrasta orkuloysnin á marknaðinum. Hví noyðir kommunan okkum at vera heft at slíkari dýrari orkuloysn?
- Hví verður prísurin á fjarhita ikki roknaður út eftir, hvat tað kostar at veita hesa tænastu til okkara?
- Hví verður prísurin á fjarhita broyttur so javnan, so vit støðugt fáa eykarokningar?
- Hví verður prísurin á fjarhita roknaður út á ein hátt, so Fjarhitafelagið krevur ov høgt gjald frá brúkarum og hevur ein ovurstóran vinning av at selja fjarhita til brúkarar?

## Kappingareftirlitið kannar Fjarhitafelagið

Frágreiðingin hjá Kappingareftirlitinum, "**Fjarhiti í Tórshavn**", lýsir viðurskiftini við fjarhitaveitingini í Tórshavnar Kommunu. Kappingareftirlitið vísir á viðurskifti, sum eiga at broytast.




Hóast frágreiðingin varð almannakunngjørd í mars 2017 undrast vit á, at Fjarhitafelagið, Tórshavnar Kommuna og SEV ongan vilja vísa til at lurta eftir Kappingareftirlitinum og rætta uppá tey viðurskiftini, sum eru órímilig hjá brúkarum av fjarhita í Tórshavnar Kommunu.

Tá vit samanbera orkuloysnir, vísa útrokningar, at:

- Fjarhiti er 17 % dýrari enn at hava oljufýring
- Fjarhiti er 50 % dýrari enn jarðhiti

Útrokningar vísa sostatt, at fjarhiti er dýrasta orkuloysn á marknaðinum, serstakliga tá vit samanbera við grønar orkuloysnir